## Gott uppskot

Umboðsnevndin hjá SEV er væl nøgd við tað seinna uppskotið til elveitingarlóg. Nevndin hevur júst viðgjørt uppskotið á eykafundi, og formaðurin, Kristian Fríðrik Olsen, sigur við Útvarpið, at uppskotið er gott og gevur SEV nógv størri møguleikar. Vinnumálaráðið hevur sent uppskotið til nýggja elveitingarlóg til hoyringar, og SEV og kommunurnar hava fingið freist til í morgin at lata vinnumálaráðnum svar og viðmerkingar.

## Várframsýningin

Felagið Føroysk Myndlistafólk hevur gjørt av at skipa fyri várframsýning, sum verður í Listaskálanum í Havn í døgunum frá 20. apríl til 27. mai. Felagið sigur, at øll, sum hava hug, kunnu lata felagnum verk til framsýningina, og felagið hevur sett eina dómsnevnd at gera av, hvørji verk sleppa við. Tey, sum ætla at royna seg og síni verk, skulu lata tey inn í tíðarskeiðinum frá 10. til 13. apríl kl. 16. Verkini skulu vera klár til at sýna fram.

# 2.600 sunnukvøld í Planta

**Í yvir eina hálva øld hevur Eitt Sunnukvøld í Plantasjuni ljómað úr føroyskum útvarpstólum. Sangurin um hetta eina sunnukvøldið í Plantasjuni hevur higartil yvirlivað yvir 2600 sunnukvøld, og kanska serliga sunnudagar, tí tað man neyvan ganga ein Kvøðuljómasending sunnudag seinnapart uttan, at størsta landaplága føroyinga verður spæld**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Seinastu vikuna hevur Útvarpið leitað eftir størstu landapláguni, ið føroyingar eiga. Tað eru morgunfrísku morgunvertirnir hjá Útvarpinum, ið hava skipað fyri. Tað skelkaði neyvan nakran, at vinnarin gjørdist Eitt Sunnukvøld í Plantasjuni við Simma. Lagið kom út, sum ein tann fyrsta føroyska útgávan og gjørdist skjótt fólkaogn. Hetta var sama ár, sum Útvarpið byrjaði at senda, og hevur lagið ljómað í sendingum líka síðan tá. Sjálvt nú út við 50 ár eftir útgávuna gongur neyvan ein Kvøðuljómasending, uttan at Eitt sunnukvøld í Plantasjuni verður spælt, soleiðis var, tá sendingin æt Ynskikonsertin og er tað enn í dag. Stutt sagt er talan um størstu Landapláguna í Føroya Søgu.

### Ung sum gomul

Alla vikuna hava føroyingar ungir og gamlir sent síni boð inn til Morgunsendingina, og sambært Kára Olsen verti í sendingini vóru tað bæði ung og gomul, ið atkvøddu fyri Eitt Sunnukvøld í Plantasjuni. Simme sjávur var ikki tikin á bóli, av at júst hesin sangurin gjørdist størsta landaplágan, hóast hann ikki beinleiðis væntaði tað, so kom tað ikki óvart á hann.

- Har kemur so nógv gott út nú á døgum, at eg visti ikki heilt, um okkurt av tí fór at vinna, tað var ikki til at vita - Um tað serliga vóru tey ungu, sum atkvøddu, so kundi tað kanska verið okkurt annað lag, helt eg. Men eg skilji, at tey ungu hava eisini atkvøtt fyri hesum lagnum, sigur Simme við Sosialin.

Lagið gjørdist greiður vinnari framman fyri Vinir, hjá Fríbjørg Jensen í útgávuni hjá Margit Petersen og Omma við Símun Konoy og Beintu Clouthier, ið løgu ájavnt á 2. plássi.

### Livandi lag

Tað var stak hugnaligt at hoyra, at Útvarpið hevði spent seg út og fingið Simma við manningini Aggu Mouritsen og Leivi hjá Fridtleifi í upprunaliga hølið, har lagið var spælt inn í Losjuni í Havn. Við sær á bassi høvdu Simme, Aggu og Leivur, Fróða Sandoy. Á upprunaligu upptøkuni spældi Poli Debess úr Kollafirði við. Hetta varð ein ótrúliga góð byrjan uppá Spæl Føroyskt Dagin, serliga tí talan er um eina sprell livandi landaplágu, ið tí hóskandi varð framførd livandi.



### Fyrsta frá Simma

Simme hevur í eitt mannaminnið ríka føroyskan tónleik, men Eitt Sunnukvøld í Plantasjuni var fyrsta útgávan hjá The grand old man í føroyskum tónleiki. Útgávan kom sambært Simma í lag, tí Hansemann Tórgarð vildi tað soleiðis.

- Hansemann Tórgarð hevði visiónir og royndi at spæla plátur inn. Hann hoyrdi um hvat gekk fyri seg við føroyskum tónleiki, og har var nokk ikki so nógv at velja í, so hann var eftir mær at koma og spæla inn.

Útgerðin var ikki tann stóra og upptøkurnar vórðu gjørdar í Losjuni, tí har stóð eitt klaver.

### Sang við einum lunga

Leivur Johannesen eigur eyðkendu røddina á lagnum. Hann sang lagið stutt eftir, at hann var sloppin út av sanatoriuminum. Eina lunga riggaði ikki, og tí varð sangurin sungin inn við megini frá einum lunga. Simme metir røddina hjá Leivi vera ein av høvuðsorsøkunum, at gamla upptøkan enn ljómar í Útvarpinum.

- Hatta er jú ikki ein genial innspæling, orsøkin til, at plátan verður spæld enn er góða lagið og orðini hjá Birna Dam og røddin hjá Leivi, sigur Simme. Hann metir, at ivasama góðskan á upptøkuni kann vera ein av orsøkunum til, at Eitt Sunnukvøld í Plantasjuni ikki fangaði uttanlands á sama hátt sum t.d. Rasmus gjørdi.

- Lagið hevur altíð riggað væl eisini, tá tað er spælt uttanlands. Edvard Nyholm Debess fortaldi, at hann á eini konsert í New York hevði spælt sær við lagið á


Nýtt frá PILGRIM

Vit hava fingið nógv nýtt heim frá Pilgrim til konufólk og mannfólk.

Sum nakað nýtt, hava vit nú eisini ur frá Pilgrim.

Støkkið inn á gólvið og síggið okkara stóra úrval og finnið gávuna til konfirmantin her.

SMÚKKUHJØRNIÐ
Niels Finsensgøta 51